# Um ikki at trívast í einum framkomnum demokratii

HERI MOHR



Tað er ikki avgerandi, hvar tín postadressa er. Um hon t.d. er í Danmark ella í Føroyum. Tí tað er skræðan, sum broytir postadressu og ikki sálin.

Mong føroysk sál í útlegd hevur sett djúp spor eftir seg í okkara mentanarheimi.

Vit kunnu tríva í rúgvuna av føroyingum, sum livdi meginpartin av lívi sínum í útlegd: V.U. Hammershaimb, Jakob Jakobsen, Nicolai Mohr, Jens Chr. Svabo, Tróndur Olsen, Regin Dahl, J.H.O. Djurhuus, Chr. Matras, Janus Øssursson, Maria Mikkelsen. Hesi, og nógv onnur, nomu føroyska/evropeiska mentan í Danmark. Sál teirra var í Føroyum, og teirra førningur frá forfedrunum varð fjálgaður og mentur í útlegd.

Og so øll tey, ið drukku úr somu keldum : Johanna Maria Skylv Hansen, Heðin Brú, Richard Long, M.A. Jacobsen, Rasmus Rasmussen, Símun av Skarði, Martin Joensen, Robert Joensen, Kristian Osvald Viderø og mong, mong onnur.

Í fjórðingøld hava vit tvær ferðir verið illa viðfarin av "føroyskum" politikki. Í 1992-1993 rýmdu føroyingar í túsundatali sálarleysir av landinum. Orsøkin til hetta óskilið var m.a. tann, at tað eydnaðist upp á fá ár (4) at niðurbróta eina annars vælvirkandi almenna fyrisiting, og tessvegna varð neyðugt at byggja hana av nýggjum (Norman Christensen).

Og í tí nýggju øldini hava landsins kosnu menn gjørt alt, ið gerast kann, fyri at forkoma landsins fíggjarorku. 1. januar 2002 varð av álvara farið undir at tveita almennan pening fyri borð. Úrslitið av hesum dárskapi hava vit ikki rættiliga merkt enn. Nógv, men ikki nokk, er skrivað um hetta løgna fyribrigdið, sum ikki átti at kunna hent í einum framkomnum demokratii.

Demokrati er annars ein sera følin og vøkur planta, men verður hon ikki væl umsitin og taðað, kann hennara vøkstur broytast til grefliga hømiliurót.

Og hesin "rótføroyski" politikkurin, sum rikin hevur verið nú í eini 10 ár – í stóran mun við villeiðandi ósannindum – hevur givið eldri fólki og gomlum, sum farin eru um "støvets år", kenslu av mentalum ótryggleika. Vanlig fólk trívast ikki í einum landi, har tey, ið ráða fyri borgum, tosa ósatt – lúgva.

Fyri okkum føroyingar er hetta einki minni enn ein sorgarleikur.

# Betri er bøtandi hond enn spillandi tunga

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna
Javnaðarflokkurin



Nú um dagarnar hevði Magni Laksafoss eina grein í fjølmiðlunum við sera grovum ákærum móti Javnaðarflokkinum.

Tað er ikki vanligt at viðgera, hvat gongur fyri seg í eini tingnevnd í smálutir, ament í fjølmiðlunum. Eftir mínum tykki er tað undir alt lágmárk, at endavenda hvørjum setningi í fjølmiðlunum, antin hann er sagdur á fundi, ella sum vanligt prát í einum steðgi. Tíverri eru tað nakrir fáir tingmenn, ið ikki hava hesa virðing fyri nevndarabeiðinum. Alt verður almannakungjørt, bæði stórt og smátt, tí allur politikkurin snýr seg, fyrst og fremst, um persónliga profilering.

At vanligi borgarin leiðist alt meira við politikarnar og politisku skipanina, er als onki at siga til, sum gongdin hevur verið í seinastuni. Tað sýnist fyri mær at verða ein kapping um, hvør kann hunddálka hvønn og koma so ofta sum møguligt í fjølmiðlarnar, næstan óansæð orsøkina.

**Øll fíggjarnevndin kann váttað**

Hevði als ikki ætlað at farið í fjølmiðlarnar í samband við niðrandi greinina hjá Magna Laksafoss. Men tá ið fylgisveinur hansara, Torbjørn Jacobsen, stuðlar uppundir útspillingarnar hjá Magna Laksafoss og dregur alla fíggjarnevndina uppí, eri eg noydd at svara aftur.

Torbjørn Jacobsen skrivar:

»Øll tey, sum manna fíggjarnevnd løgtingsins, kunnu vátta, at hvørt orð í greinini hjá Magna Laksafoss er sannleikin, soleiðis, sum vit hava upplivað hann«.

Eg má tíverri skuffa Torbjørn Jacobsen, eg kann als ikki vátta, at hvørt orð í greinini hjá Magna Laksafoss er sannleikin, soleiðis sum eg havi upplivað hann.

**Profileringstrongdin størri enn at náa úrslit**

Havið ikki sitið í fíggjarnevndini og lagt mær í geyma, hvør sigur hvat fyrst. Ofta er tað ein útveksling av hugskotum, sum í felags dialogi menna seg til avgerðir, ið verða veruleiki. Vit hava tjakast um ymsar tankar, soleiðis sum tað eigur at vera í politikki. Ongin er komin við nøkrum lidnum uppskoti, heldur ikki Magni Laksafoss.

Hetta hevur eisini gjørt seg galdandi, tá ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur verið á fundi í nevndini. Frá fyrsta degi bað hann um samstarv við nevndina, og hava fleiri góðir fundir verið, har tjakast hevur verið yvir um borðið.

**Játtannarskipan landsins**

Til dømis eri eg vís í, at initiativið hjá fíggjarmálaráðharranum at stilla seg á odda fyri at stramma upp og krevja, at allir stovnar landsins skulu halda sína játtan, er úrslit av einum fruktagóðum dialogi millum fíggjarnevndina og landstýrismannin.

Fíggjarmálaráðharrin tók stig til, og kallaði allar stovnsleiðarar til fundar har hann gjørdi greitt, at játtan og nýtsla skulu fylgjast at. Síðan kom lógin um játtannarskipanina aftur á tingborð, í samráð við fíggjarmálaráðið. Tá hevði fíggjarmálaráðharrin loyst knútin, sum hevur gjørt, at henda lógin ikki hevur vunnið frama fyrr enn nú.

**Bjálving og orkuverkætlannir**

Stóra stríðið stendur um, hvør kann markera seg sum pápi at uppskotunum um orkusparing og at seta pening av til orkuverkætlannir. Tað hevur alt at siga, hvør kann standa fram í fjølmiðlunum og siga, hetta er mítt hugskot. Og minni týdning, at hesi tiltøk nú eru veruleiki.

Viðvíkjandi teimum 15 mió til bjálving av almennum bygningum, so bleiv hetta hugskot endaliga snikkað til og avrátt var at 15 mió skuldu setast á fíggjarlógina, á fundi í tinghúsinum millum lítlu samgongu og meirilutan í fíggjarnevndini tann 11. desember um kvøldið, eftir at Kaj leo Johannesen og Jóannes Ejdesgaard høvdu verið á fundi í fíggjarnevndini.

Sum eg minnist tað, so var tað serliga John Johannessen og undirritaða, ið royndu at fáa undirtøku fyri tankanum millum samgongulimir. Magni Laksafoss var merkiliga óvirkin á fundinum. Um tað var tí, at hann ikki hevði áhuga í at hetta skuldi verða ein verkætlan, ið samgongan í felag hevði avrátt at seta í verk, skal eg lata verða ósagt.

Viðvíkjandi at seta pening av til orkuverkætlannir, so avráddi samgongumeirilutin í fíggarnevndini (Anfinn Kallsberg, Bjørn Kalsø, Magni Laksafoss, Eyðgunn Samuelsen) at seta pening av til hetta.

**Vildi taka initiativið frá landstýrismonnunum**

Í samband við fíggjarlógarviðgerðina, vóru løgmaður og fíggjarmálaráðharrin á fundi við nevndina tann 11. desember 2008 fyri at viðgera, hvat kundi gerast við hallið á fíggjarlógini.

Nevndin hevði havt eitt hugarok og sett eina røð av skipanum, ið ein kundi broyta, upp á talvuna. Hetta vóru uppskot, nøkur av teimum kundu minka um útreiðslurnar og onnur økja um inntøkurnar.

Løgmaður boðaði beinanvegin frá, at arbeiðið í samgonguni at viðgera hesi mál var byrjað, og at allar skipannir vóru til tjak. Eisini var sagt, at árið 2009 fór at verða serstakt, tí landstýrið fór at koma við lóggávu, ið vildi minka um strukturella hallið, so hvørt sum semja var um hetta og lógaruppskotini vóru klár.

Magni Laksafoss vildi, at fíggjarnevndin sjálv skuldi leggja lógarbroytingar av hesum slag fyri løgtingið, saman við álitinum til fíggjarlóg, og ikki at landstýrið skuldi hava initiativið. Tað var eyðsýnt, at Magni Laksafoss hevði sera ringt við at góðtaka, at hann ikki hevur ein leiðandi leiklut í fíggjarmálum.

**Miðvís jagstran av Javnaðarflokkinum**

Tað hendir ferð eftir ferð, at Magni Laksafoss sýnist at hava eina aðra dagsskrá enn samgongan. Hann hevur bæði í nevndararbeiði og í løgtingsarbeiði kastað saman við pørtum av andstøðuni. Seinnu tíðina hevur hann miðvíst lagt eftir Javnaðarflokkinum. Hvat hansara motiv er, antin tað er at renna ørindi fyri onkran annan, ella tað er ónøgd við at samgongan er til, kann ein bert gita um.

**Má taka seg saman**

Haldi ikki tað tænir nøkrum endamáli at hava samskifti í fjølmiðlunum heldur enn í samgonguni. Tað skal verða mín vón, at øll í samgonguni, íroknað Magni Laksafoss, geva henni ein møguleika at virka og fáa framt tey tiltøk, ið eru neyðug at basa kreppuni.

DEKKMASTER.FO
...tá ið prísurin eisini er avgerandi!
fastir, lágir prísir á dekkum og felgum

Kulir hjálmar

EINANS 790,-



Flottir heildekkandi hjálmar við allergivinarligari bjálving og løttum lási til høkureim. Klárt glas, ið ikki skøvast. Góðkendir til motorsúkklu og tí eisini væl egnaðir til knallert og skutara.
Fáast í fleiri litum og støddum.

Fantastiskir dekkprísir

Prísdømi

| | |
|---|---|
| 175/65-14 | úr 620,- |
| 195/55-15 | úr 775,- |
| 195/65-15 | úr 795,- |
| 205/55-16 | úr 890,- |
| 205/40-17 | úr 965,- |
| 225/45-17 | úr 995,- |
| 225/40-18 | úr 1.290,- |
| 235/35-19 | úr 1.710,- |




Nýtt felgukatalog við øllum teimum flottu felgunum frá Dekkmaster kann nú takast niður á www.dekkmaster.fo